


**_Nr. 10_** **_12. mai 2013_** **_73. árg._**

# Triðja krossarorðið

*Triðja krossarorðið er: "Kvinna, har er sonur tín!" – "Sí, har er móðir tín!"*

*Jóh. 19,26-27.*

Tað er okkurt vakurt og sterkt yvir hesum orðum. Jesus vísir umsorgan fyri mammu síni. Á ein hátt tekur hann frástøðu frá henni. Á krossinum er hann ikki sonur hennara. Har er hann bara Guds sonur. Tað er Guds sonur, sum skal doyggja á einum krossi fyri allar heimsins syndir. Og kortini vísir hann henni umsorgan, hann er jú góður við hana.

"Kvinna, har er sonur tín!" Hjá Mariu mundu tímarnir á Golgata vera ein ótolandi pína. Hon upplivir her, tað sum gamli Símeon hevði profeterað, stutt eftir Jesu føðing: "Eisini tína egnu sál skal svørð fara ígjøgnum." Luk. 2,35. Jóhannes, tann lærusveinurin, sum Jesus elskaði, stóð undir liðini á henni at stuðla og hjálpa henni. Tað er, tá ið Jesus sær hesi bæði við krossins fót, at hann kemur við bíbliuteksti okkara.

Tað er ikki nakað niðrandi í tí, at Jesus kallar hana "kvinna". Tað greiðir bara frá tí sambandi, sum hon nú má koma í mótvegis honum. Jesus má eisini gerast Frelsarin hjá Mariu! Nú er hon ikki mamma hansara, men "kvinnan" Maria, sum Jesus við stórari umsorgan letur upp í hendurnar á tí lærusveininum, sum hann hevði elskað so høgt!

Einaferð fyrr hevði Jesus verið noyddur at víst hana burtur við hesum orðum: "Hvør er móðir mín, og hvørjir eru brøður mínir?" So peikaði hann á lærusveinar sínar og segði: "Sí, hetta er móðir mín og brøður mínir!" Matt. 12,48-49. Ta ferðina varð Maria sett uttan fyri Jesu nærmasta skara. Her við krossin sleppur hon uppí. Við krossin verður ein nýggj familja borin í heim. Við krossin

streyma kærleiki, hiti og umsorgan til eina heila verð. Øll verða roknað uppí!

Teksturin er ein av teimum seinastu, har vit møta Mariu. Tað er ringt at skilja, hvør pína tað man hava verið fyri hana at síggja egna son sín verða krossfestan. Hugsast kundi, at hon ikki hevði orkað at komið, og at hon bara hevði bíðað burturfrá, so at hon slapp undan at síggja líðingarnar hjá soni sínum. Mong mundu havt samkenslu við henni í einari slíkari støðu og skilt eitt slíkt val.

Men Maria kom og varð standandi undir krossinum hjá soni sínum. Maria tók kross sín upp og varð standandi við krossin og undir krossinum. Hon flýddi ikki! Hon hevði ongar aðrar staðir at fara enn til krossin! Hon speglar egnu líðing sína í teirri líðingini, sum Guds sonur hevur gjøgnumlivað fyri hana.

Tað slepst ikki undan líðing her í lívinum. Vit hava øll okkara, sum vit mugu fara ígjøgnum. Og summi fáa meir enn onnur. Besta staðið at fara við pínu síni er til Jesu kross!

Evangeliini nevna ikki Mariu eftir Jesu uppreisn. Men í Ápostlasøguni hoyra vit:

“Allir hesir vóru samhugaðir áhaldandi í bønini saman við nøkrum kvinnum og Mariu, móður Jesu, og brøðrum hansara.” Áps. 1,14. Maria valdi samfelag teirra heilagu og bønina! Er tað ikki flott!

Maria fekk kraft at fara víðari í lívinum. Hon gjørdist partur av Guds familju, tí familju, sum byggir á tað, Jesus hevur gjørt á krossinum.

Sten Sørensen.
*Effie Campbell* umsetti.

# Hvør er trupulleikin?

Jesus segði við lærusveinarnar: ”Eina náttina hevði eg 99 trúgvandi í kirkjuni. Eg hugdi út, og eg sá ein syndara. Eg fór frá teimum 99 og gavst ikki, fyrr enn eg fann syndaran.” Trupulleikin í dag er, at kirkjan elskar tey 99 og gloymir syndaran. Vit verða noydd at broyta okkara hugsanarhátt og fara at hyggja, sum Jesus gjørdi! Jesus sigur við okkum: ”Skunda tær og far út um gøtur og stræti í staðnum, og leið inn higar fátæk og kryplar og blind og hølt og noyð tey at koma inn, fyri at hús mítt kann verða fult.” Luk. 4,21-23.

*e.c.* ums.

# Guds armur

*“Frá hásæti Harrans er útrætt hond.” 2. Mós. 17,16.*

Jesus sigur um seg sjálvan, at hann er alfa og omega, tað vil siga byrjanin og endin. Hann kennir endan á eini hending, áðrenn hendingin er farin í gongd. Stúr ikki fyri morgindegnum, tí Gud er longu har!

Á einum møti í Meinigheitshúsinum, sum kallast “Vón fyri framman”, vitnaði ein kona:

Dóttir mín gjørdist sera sjúk av krabba. Hon fór ígjøgnum eina harða viðgerð, og tann tíðin var ikki stuttlig. So varð hon søgd at vera frísk. Hennara hægsta ynski var at sleppa ein túr til Róm, til Vatikanmuseumið.

So fór hon; men meðan hon er burtur, gerist eg sjálv sjúk av krabba, og eg skuldi niður á sjúkrahús. Eg hugsaði við sjálvari mær: “Hvat geri eg nú?” Tí hon var sjálv so niðurundirkomin, og eg ivaðist í, um hon mundi tola at hoyra hetta. So helt eg kortini, at eg var noydd at geva henni boð, tí um eg var niðri, tá ið hon kom aftur, skilti hon einki av nøkrum. So eg sendi henni eini sms-boð.

Hon kom so heim aftur, og tað var ikki fyrr enn nú ein dagin, at hon segði mær frá, hvussu tað var, tá ið hon fekk boðini. Hon var stødd inni í Sixtinska Kapellinum, allarinnast inni og hægst uppi. Har stóð hon og hugdi so hugtikin at málninginum undir kuplinum. Tú sást ein arm toyggja seg uppeftir, og niður úr Himli kom Guds armur og rætti seg niður til hetta menniskjað, sum var í neyð og rópti til hansara um hjálp. Hetta var ein heilag løta. Tað var, sum málningurin gjørdist livandi, og armarnir strektu seg nærri og nærri og nærri hvørjum øðrum. Tá hoyrdi hon brádliga, at fartelefonin bibbaði í lummanum, og hon las boðini frá mær.

Tá hevði Gud longu verið har frammanundan og talað troyst og ugga til hennara hjarta gjøgnum hesa myndina, tí: “Her niðri eru hinir ævigu armar!” 5. Mós. 33,27. Og: “Frá hásæti Harrans er útrætt hond.” 2. Mós. 17,16. Sært tú ikki hesa myndina fyri tær. Harrin situr í hásæti sínum, og hann strekkir sín arm niður ímóti tær, og hann styrkir og uggar teg. Hann vil ongantíð fara frá tær, tað hevur hann lovað.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Bíða ikki eftir tí fullkomnu løtuni, men tak løtuna og fá tað fullkomna burtur úr henni.

*e.c.* ums.

# Fjórða krossarorðið

*Tað fjórða orðið, Jesus segði á krossinum, er : "Gud mín, Gud mín, hví fórt tú frá mær?"*

*Matt. 27,46 og Mark. 15,34.*

Hetta er Jesu myrkasta og tyngsta løta, sum vit lesa um her í hansara fjórða krossarorðið: "Gud mín, Gud mín, hví ert tú farin frá mær?" Hugsa tær til, at sonur Guds úr Himli skuldi uppliva, at Gud Faðir í Himli fór frá honum. Jesus endurgevur her Sálm 22,2.

Mong vóru farin frá honum gjøgnum lívið – sí Jóhannesar evangeliið kap. 6. Lærusveinarnir vóru farnir frá honum í Getsemane.

Tað ringasta av øllum var kortini, at hann upplivdi, at Gud fór frá honum. Hvat var tað, sum hendi? Jú, í hesi løtu fall vektin av heimsins synd niður á Jesu hjarta og alla hansara veru. Hetta var løtan, tá ið hann, sum ikki visti av synd, varð gjørdur til synd fyri okkum. 2. Kor. 5,21 sigur: "Tann, sum ikki visti um synd, gjørdi hann til synd okkara vegna, fyri at vit skulu verða Guds rættvísi í honum."

Jesus upplivdi her tann óumberliga skilnaðin frá Gudi, sum syndin førir við sær. Jesus noyddist inn í helviti fyri okkara synd. Tí legði Gud vreiði sína, sum hann hevði havt mótvegis verðini, yvir á sonin. Hann skuldi bera tað, sum eingin annar kundi. Her ber Jesus allar heimsins syndir!

Hetta gjørdi Jesus fyri okkum. Gud vil ongantíð fara frá okkum. Tí Jesus hevur goldið fyri okkara synd!

Sten Sørensen.
*Effie Campbell* umsetti.

---

Bæði lógartrældómur og vísdómslæra tøma krossin fyri kraft hansara. Summi tora ikki heilt at líta á náðina, men vit mugu skilja ímillum lógina og náðina. Gud hevði ongantíð hugsað sær, at vit skuldu blíva heilaggjørd gjøgnum lógina.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 12. mai. | Tekstur: | Áps. 1,6-11 | bíbliuorð: | Áps. 1,8b |
| 19. mai. | Tekstur: | Jóh. 16,5-15 | bíbliuorð: | Jóh. 16,13a |
| 26. mai . | Tekstur: | Luk. 5,1-11 | bíbliuorð: | Matt. 4,19 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74